# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tá eg vaknaði tann eina morgunin, hugdi ein seyður inn gjøgnum kamarsvindeygað*
*Barry Ferguson, skotskur liðskipari*

# – Vit skulu vinna



*Rógvi Jacobsen tykist vera spælarin, sum skotski landsliðsvenjarin hugsar mest um, tá tosað verður um álopspartin hjá Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Bjartskygnið ræður aftur á skotska landsliðnum, sum hevur møguleika at spæla seg til EM-endaspælið. Men tað krevur ein sigur í Føroyum, og skal tað gerast veruleiki, krevur venjarin ein 100% innsats frá hvørjum einasta spælara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Eg vænti ein truplan dyst, tí Føroyar hava tikið seg nógv fram, síðani vit seinast spældu móti teimum. Og í Føroyum hava øll lond tað trupult. Tað hava bæði Týskland, Frakland, Kekkia, Italia og - ikki minst - Skotland sannað. Liðið er eisini púrasta broytt, síðani tann dystin. Tá høvdu føroyingar eina rúgvu av skaðum at dragast við, og tí er talan um púrasta øðrvísi uppgávu hjá okkum, helt skotski venjarin, Alex McLeish, tá vit eftir venjingina mánadagin fingu orðið á hann.

Tit hava eisini sjálvir nakrar spælarar á skaðalistanum?

- Ja. Í løtuni eru fimm spælarar úti við skaða. Fýra av hesum spæla í Celtic og ein í Aberdeen. Men vit hava fleiri góðar spælarar, sum koma í hópin.

## Eru í menning

Hóast McLeish roknar við einum truplum dysti, so heldur hann kortini, at skotar eiga at vinna dystin.

- Vit vita, hvussu Føroyar spæla. Teir eru sera væl skipaðir í verjuni, og tí er trupult at skora móti teimum. Og við Rógva Jacobsen hava teir ein fínan spælara. Málið móti Italia var ein framúrskarandi headeri, sum kom eftir gott uppspæl, har italska verjan varð tagað sundur.

- Hinvegin hava vit gott sjálvsálit í løtuni. Vit hava havt góð úrslit seinastu tíðina, og spælararnir eru væl fyri. Tað er tó altavgerandi, at vit taka dystin í allar størsta álvara. Talan verður um truplan dyst, og eru vit ikki púrasta tendraðir, kann hann væl gerast nógv truplari, enn vit brýggja okkum um.

Skotskur fótbóltur hevur tikið seg nógv fram, síðani tit seinast vóru í Føroyum. Hvør er frágreiðingin handan hetta.

- Fyrst og fremst, so hevði Bosman-dómurin øgiliga keðiliga ávirkan á skotskan fótbólt. Berti Vogts hevði ein stóran trupulleika, tí ungir skotskir spælarar sluppu ikki framat í feløgunum, sum heldur keyptu útlendskar stjørnur í hópatali. Í dag vita feløgini, at tey hava ikki ráð til alt, og tí fáa okkara spælarar nú aftur møguleikan. Og tað kemur landsliðnum tilgóðar.

Og tit hava enn møguleikan at koma til EM, hóast tit eru í einum truplum bólki?

- Ja. Sjálvandi eru Italia og Frakland favorittar, og Ukraina er eisini styrkismett oman fyri okkum. Men vit fylgja væl við, og megna vit at vinna »løttu« dystirnar, so hava vit eisini møguleikan, tá vit í seinastu umførunum skulu takast við favorittarnar.

## Fantastisku Tartan Army

Tað sæst aftur í býarmyndini, nú skotar á fjórða sinni vitja í Føroyum. Tartan Army, sum áskoðarar teirra verða nevndir, seta sín avgjørda dám á, og McLeist dylur ikki fyri, at hetta hevur stóran týdning fyri liðið.

- Alla staðni, har vit fara, hava vit áskoðarar við okkum. Teir stuðla okkum ótrúliga væl, og vit ynskja eisini at geva teimum nøkur góð úrslit, segði skotski venjarin.

## FAKTA UM MCLEISH

**Alex McLeish »Big Eck«** verður mettur sum ein av størstu spælarunum í skotskari fótbóltssøgu. Hann var partur av sterka liðnum hjá Aberdeen, sum undir leiðslu av Sir Alex Ferguson vann Europa-Cup fyri steypavinnarar í 1983, og við drúgvari tænastu verður hann roknaður sum ein legenda í felagnum.

**Alex McLeish**
*Føddur 21. januar 1959*

**Hagtøl:**

| | |
|---|---|
| *Sum spælari* | |
| Aberdeen (liðskipari frá 1990) | 1976-1994 |
| Scottish Premier League | 3 ferðir |
| Scottish Cup | 5 ferðir |
| Scottish League Cup | 2 ferðir |
| European Cup Winners Cup | 1 ferð |
| European Super Cup | 1 ferð |
| 77 landsdystir fyri Skotland | |
| Við í trimum HM-endaspølum | |
| Ársins spælari í 1990 | |
| *Sum venjari* | |
| Motherwell | 1994-1998 |
| Hibernian | 1998-2001 |
| Rangers | 2001-2006 |
| Skotland | 2007- |
| Scottish Premier League | 2 ferðir |
| Scottish Cup | 2 ferðir |
| Scottish League Cup | 3 ferðir |
| Scottish first Division | 1 ferð |

# Vildi keypa Jákup

**Tá Jákup Mikkelsen í kvøld spælir sín 50. landsdyst fyri Føroyar, verður tað móti venjaranum, sum fyri sjey árum síðani vildi keypa føroyska landsliðsmálverjan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Árini 1998 til 2001 var Alex McLeish nevnliga venjari hjá skotska Hibernian. Fyrsta árið tók hann um stýrisvølin móti endanum av kappingarárinum, og fekk ikki bjargað liðnum undan niðurflyting, men steðgurin í næst bestu deildini varð tó bert eitt ár.

Aftur komin í bestu deildina vildi venjarin millum annað styrkja málverjasessin, og ynskið hjá venjaranum var her føroyski málverjin í Herfølge. Ein áhugi, sum hann í dag váttar var rættiliga ítøkiligur.

- Vit skuldu brúka ein málverja, og ein agentur segði mær, at Jákup var eitt gott boð. Eg havi gott samband við fleiri folk innan danskan fótbólt, og eg spurdi hesi, hvørt talan var um ein málverja, sum vit kundu brúka. Tað mettu tey avgjørt, og alt endaði við, at vit fóru í samráðingar við Herfølge. Teir kravdu tó meira, enn vit høvdu ráð at rinda, og so varð tann handilin av ongum, segði McLeish, tá hann eftir skotsku venjingina týskvøldið varð spurdur um áhugan fyri føroyska málverjanum.

## Gyltur møguleiki

Í dag man tann hendingin vera nakað, sum Jákup Mikkelsen hevur lagt aftur um bak. Men just hendingin við Hibernian var ein av fleiri orsøkum til, at Jákup á sumri 2001 gavst í Herfølge. Hann hevði snøgt sagt mist álitið á leiðsluni í felagnum.

Millum annað segði hann soleiðis í opinskáraðum viðtali við Sosialin tann 19. juni í 2001. Eitt viðtal, sum varð gjørt, um sama mundi, sum sáttmálin við Herfølge gekk út.

»- Eg tosaði við ein blaðmann í Skotlandi, sum hevði tosað við Alex McLeish, sum tá var manager í Hibernian. Hann segði seg hava fingið allar lutir í sáttmálatilboðnum at vita, og millum annað hevði eg fingið frían bil og íbúð umframt eina mánaðarløn upp á 100.000 kr. netto. Eg tosaði síðani við Kenneth Wegner, sum var stjóri í Herfølge, men hann tvíhelt um, at teir einki høvdu hoyrt frá nøkrum.

- Eg helt hetta vera eitt sindur løgið, tí tað stóð eisini at lesa á tekstvarpinum, men tað var ikki fyrr enn eg tosaði við Faxe, tá vit samráddust seinast, at eg fekk at vita, hvat veruliga var farið fram. Hann segði mær, at Hibernian vóru til reiðar at rinda 2 milliónir, og tað er sjálvandi keðiligt at fáa slíkt at vita seinni.

- Seinni hetta árið spurdi Wegner meg, um eg møguliga hevði havt áhuga í at komið til FCK, og eg svaraði tá ja. FCK og Herfølge fóru tá í ítøkjuligar samráðingar, har FCK vildi lata 2,5 mió. kr. Herfølge royndi – við at nýta boðið hjá Hibernian á 2 mió.kr. – at trýsta prísin upp, og alt endaði við, at FCK ístaðin keyptu Michael Steensgaard heim úr Onglandi fyri 2,7 milliónir«